ATLANTIC AIRWAYS

SUMMARKAPPINGIN '09

Stóra summarkappingin hjá Sosialinum

Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 22:
Leiðin til Reykjavíkar
8 síður við spennandi tilfarið um summar

Ein av søguligu varðunum í Reykjavík er móttøkuhúsið hjá borgarstjóranum. Tað var júst her – á Høfd – at Ronald Reagan og Michael Gorbatjov í 1986 hittust til fundin, sum í dag stendur sum ein søguligur varði í tí, sum gjørdi enda á kalda krígnum

Lætt í **ferðsluni** í Reykjavík

Tað munnu vera fáir høvuðsstaðir, har tað er eins lætt at ferðast í bili, sum tað er í Reykjavík

ÍSLAND

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Sum ferðandi kann tað ofta vera hent at hava fingið sær leigubil til vega. Um ikki annað slepst tá undan at vera bundin at bussum og øðrum kollektivum ferðamiðlum, og tær nýtist ikki at ansa eftir klokkuni á sama hátt, tá tú bert ert bundin at tíni egnu ferðaætlan.

Ein trupulleiki kann tó vera tilvenjingin til nýggja ferðslumynstrið. Og ikki minst, hvussu tað er at finna runt á fremmandi plássinum. Ofta enntá soleiðis, at tú ikki ert hampuliga tryggur á óvandu vegunum, fyrr enn tað er tíð at lata leigubilin inn og seta ferð aftur móti heimstaðnum.

Men soleiðis er ikki í Reykjavík. Nú hevur yvirritaði ikki roynt seinna alternativið, men tað tykist, sum er tað líka lætt hjá einum havnarmanni at finna runt í Reykjavík, sum tað er hjá einum bygdarmanni at finna runt í Tórshavn.

Nýtir tú fáu høvuðsvegirnar sum varðar, er trupult at villast heilt burtur av leið, og kortini, sum verða latin við leigubilinum, eru sera løtt at lesa og fylgja. Hartil er ferðslan á vegunum í Reykjavík í dag ikki stórt meira, enn hon er eftir eystara Ringvegi eftir arbeiðstíð, og tíð er sjáldan orsøk at fáa nakað serligt av nervum, meðan koyrt verður.

Vert er at bíta merki í, at parkeringsviðurskiftini í Miðbýnum eru skipað á sama hátt, sum borgarstjóran í Havn barslaði við í blað okkara í gjár. Stór kollektiv parkeringsøki eru at finna – eitt nú við havnarlagið – og tá kostnaðurin fyri básarnar liggur undir eina føroyska 5-krónu um tíman, er hetta ikki tað, sum koppar nøkrum ferðabudgetti.

Og so kann heilsast og sigast, at tað er nóg mikið at koyra eftir í Reykjavík. Søgu- og listasøvn eins og aðrir mentanarbygningar eru nógvir í tali. Høfd, har Reagan og Gorbatjov byrjaðu endan á kalda krígnum, og ikki at gloyma mongu kendu ferðamálini, so sum Gullfoss, Geysir og Bláa Lónið, sum íslendingar í áratíggjur hava nýtt at branda seg sjálvar við. Somikið sterk er brandingin mótvegis ferðamanninum í dag, at tað mest sum er líkamikið, hvørja bygd koyrt verður til. Søgur um víkingar og stórslignar náttúruupplivingar lúra allastaðni.

Melda teg til Club Atlantic og

VINN FERÐASEÐLAR

og fá sertilboð sendandi við telduposti

Øll, sum tekna seg, eru við í lutaksti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

Melda til á: www.atlantic.fo

Tel 34 10 00

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo